# Løgreglan í ø›ini inn á Bruce Springsteen



Bruce Springsteen hevur fingi› ta› mesta av løgregluli›num í New York uppá nakkan, eftir at hann hevur skriva› ein sang, um hendingina tá f‡ra løgreglumenn skutu og drupu ein innflytara.

Sangurin sum eitur American Skin, handlar um hendingina, tá tann 22 ára gamli Amadou Diallo úr Guinea var› skotin til dey›is. Teir f‡ra løgreglumenninir í New York lótu 41 skot av móti unga manninum, tá hann royndi at taka mappuna úr lummanum.

Løgreglumenninir hava seinni fortalt í rættinum, at teir hildu at hann royndi at fáa fatur á revolvaranum hjá sær. Diallo var raktur av 19 av teimum 41 skotunum, harav vóru fleiri av skotunum drepandi.

Tá rættarsakin var› hildin, vóru allir løgreglumenninir funnir ósekir í mor›i. Óvist er um løgreglumenninir heldur vóru dømdir fyri óvilja› manndráp.

Bruce Springsteen spældi fyrstu fer› henda n‡ggja sangin á eini konsert hann helt í Atlanta tann 6. Juni.

Felagsskapurin hjá løgreglumonnum í New York hevur, í skrivi, heitt á allar sínar limir, um at halda seg burtur frá teimum 10 konserturnum, sum Bruce Springsteen eftir ætlan fer at halda í New York, á hesi konsertfer›ini. Eisini var› heitt á løgreglumenninar, um ikki at arbei›a sum trygdarvør›ar fyri Bruce Springsteen í frítí›ini.

-Hetta var júst tí›in, tá sárini eftir tilbur›in vóru um at gerast heil aftur, og so kemur hann og opnar tey aftur vi› hasum sanginum, sigur forma›urin í felagnum hjá løgrelgumonnum í New York um Bruce Springsteen.

Um løgreglan í New York ikki er gla› fyri henda n‡ggja sangin, so er mamma til tann dripna drongin ta›. Hon hevur takka› Bruce Springsteen fyri sangin, og vænta› ver›ur at hon fer á pallin saman vi› Bruce Springsteen til onkra av komandi konsertunum.



# Oasis aftur í tvíningum

Ein av best umtóktu rokkbólkunum úr Onglandi seinastu árini er Oasis. Ta› eru teir bá›ir brø›urnir Noel og Liam Gallagher sum standa á odda fyri bólkinum. Serliga er ta› Noel sum roynir seg sum sangskriva, me›an bró›urin Liam, fyrst og fremst er at rokna sum sangari.

Ta› hevur mangan veri› buldraligt í Oasis. Ofta hava veri› samanbrestir millum teir bá›ar brø›urnar, sum hava meira enn vanliga ringt vi› at semjast sínamillum. Teir hava í enskum blø›um ofta veri› endurgivnir fyri at spilla hvønn annan út, men altí› hevur ta› rætta seg aftur.

Frammanundan seinastu útgávuni hjá bólkinum, sum nevnist Standing On The Shoulders Of Giants, vóru tveir av limunum í Oasis útskiftir. Sagt ver›ur um bólkin, at hann ongatí› hevur spælt so væl sum sí›ani teir bá›ir n‡ggju limirnir vóru innlima›ir.

Sølan av n‡ggju útgávuni hevur veri› so sum so, men ummælini hava øll veri› gó›.

Eftir at Oasis høvdu veri› nakrar fáar vikur á konsertfer›, var› gali› aftur. Teir bá›ir brø›urnir fóru upp at skeldast, og endin var at Noel r‡mdi til hús. Í løtuni spælir guitaristurin hjá Paul Weller, Matt Deighton, í hansara sta›.

-Eg havi tey seinastu sjey árini gjørt alt hvat eg eri mentur, fyri at halda saman uppá bólkin, men í løtuni klári eg ikki at vera í rúmi saman vi› beiggja mínum, hann er milt sagt ótolandi. Vit eru rættuligir óvinir beint nú, sigur Noel Gallagher úr London, har hann tekur sær av løttum saman vi› familjuni, me›an restin av bólkinum er á konsertfer›.

Ætlanin er tó, at Noel skal møta bólkinum aftur í næsta mána›a, men í løtuni er einki sum talar fyri, at hetta ver›ur veruleiki, tí enn er ósemjan millum teir bá›ar Gallagher brø›urnar ikki loyst.

Annars spæla Oasis í Danmark seinast í hesum mána›anum, tá teir eru eitt av høvu›snøvnunum á Roskilde Festivlainum.



## UK TOP 20 CHARTS

### Albums

1. Reload / Tom Jones
2. The Marhsall Mathers LP / Eminem
3. Greatest Hits / Whitney Houston
4. Crush / Bon Jovi
5. Play / Moby
6. Inspiration / Jane McDonald
7. Oops! I did it agian / Britney Spears
8. Onkas big monka / Toploader
9. Rise / Gabrielle
10. Fold your hands child... / Belle & Sebastian
11. 2001 / Dr. Dre
12. Out there and back / Paul van Dyk
13. White ladder / David Gray
14. Supernatural / Carlos Santana
15. Greatest Hits/shining like... / Paul Simon
16. The Man Who / Travis
17. Gladiator-OST / Hans Zimmer & Lisa Gerrard
18. Brave New World / Iron Maiden
19. Greatest Hits / Simply Red
20. S Club / S Club 7

**Kelda: BBC**

## 3 arin

### Mest seldu fløgur

1. Crush / Bon Jovi
2. Túsund smíl / Kular Røtur
3. Absolute Music 23 / Ymisk
4. Eurovision song contest 2000 / Ymisk
5. Greatest Hits / Whitney Houston
6. Oops! I did it again / Britney Spears
7. Careless Whisper vol. 5 / Ymisk
8. Malan / Malan
9. Wings of Love / Brdr. Olsen
10. Brave New World / Iron Maiden
11. Northern Star / Melanie C
12. Børneradio - fritterhits / Ymisk
13. Voice Dance Hits / Ymisk
14. Hits For Kids / Ymisk
15. The Platinium Album / Venga Boys
16. In stereo / Bomfunk MC'S
17. Writing on the wall / Destiny's Child
18. Over the line / Bellamy Brothers
19. Binaural / Pearl Jam
20. Celebration / Smokie

**Kelda: 3´arin**

## Føroyski Pop TOP listin

### Pop Top listin

1 Ragnar í Vík / There's a tear in my beer
2 Malan Thomsen / Stjørnurnar Blinka
3 Taxi / Ísakøld
4 Stanley Samuelsen / Um eg kundi kvø›i›
5 Pætur vi› Keldu / Love
6 Frændur / Brot og vandasker
7 Sølva & Bergmenn / Tí›arfló›
8 Ti›na› / Torir Jesusi tú fylgja
9 Moira / Omaneftir ni›aneftir
10 Jóannes Jakobsen / Sangur um ein klút
11 Kular Røtur / Vinur mín Nósi
12 Beinta Zachariassen / Lítla Barn
13 Kristina Heldarskar› / Til mánan
14 Rakul Bærendsen / Minnismyndin kær
15 Present Past / Mr. Sleazy
16 Magni Christiansen / Ein dag eg skal
17 Heine Lutzen / Vit vóru orsøk
18 Jørgin Dahl / Moments
19 Malin Zachariassen / Æra til Guds lamb
20 Petur Háberg Jacobsen / I can go on

**Eykaløg:**

- Kular Røtur / Hon er omma mín
- Síðsta Skríggj / Eitt forelskað par
- Malan Eyðunsdóttir / Minnist tú hitt summarið

Postbústaðurin er: **Pop Top Listin, Box 322, 700 Klaksvík**
Eisini ber til at atkvøða umvegis heimasíðuna:
**www.pegasus.fo/poptop**
Evsta mark fyri atkvøðugreiðslu er fríggjakvøld klokkan 18

## Svara so!???



## 20 Spurningar til: Ginnu Midjord

Navn?
Ginna Midjord
N r ert t f¿dd?
28-07-80
Ert t gift ella
tr lova ?
Nei
Besti matur?
Skerpik¿t og eplir
Besti drykkur?
B52, annars er Peru
sodavatnin hj Restorff
ikki so galin heldur
Hv¿rjum t nleiki
lurtar t eftir?
M r d mar r ttuliga v l
country, men lurti t mest
eftir poppi og rokki
Hv¿r er besti sangari?
Patsy Cline ella George
Michael
Hvat er t n besta fl¿ga?
The Best Of Patsy Cline
Hvat er t n st¿rsti
veikleiki?
M n sonevnda sangr¿dd
Hvat er t n besti
pers nligi eginleiki?
Ta mugu onnur heldur
meta um
Hevur t naka
fr t ar triv?
Beachball Sandager i
Hvat er best R s2?
Eingin ivi.
Countryt nleikurin hj
Lailu
Hevur t nakra
fyrimynd? Babba (Jens
Midjord)
St¿rsta uppliving?
T gu d tturin kom
ver ina
St¿rsta skuffilsi?
Beckham er giftur
St¿rsta ynski?
hmm.....
Besta b k t hevur
lisi ?
Gone With The Wind hj
Margaret Mitchell
Besti filmur t hevur
s ?
Somulei is Gone With The
Wind vi Clark Gable og
Vivian Leigh
Hv¿rjar 3. lutir hev i
t tiki vi eina
oy ioyggj?
Penn, blekk og papp r. Eg
st rtr vist vi hesum
lutum
Hevur t eitt motto?
Sko a ikki hundin
h rinum